# Mín besta uppskrift

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Törnroos



UPPSKRIFT: Jacobina Jacobsen

## Biscotti – italskar smákøkur

| | |
|---|---|
| 100 gr | av heslinøtum ella mandlum |
| Rivið skal | av einari appilsin |
| 100 gr | av margarin |
| 1 ¼ dl | av sukri |
| ½ dl | av ljósum siroppi ella |
| 1 dl | av flótandi hunangi |
| 1 | egg |
| 275 gr | av hveitimjøli |
| ½ tesk | av bakipulvuri |
| ¼ tesk | av natron |
| ¼ tesk | av salti |
| 2 tesk | av malnum korennum |
| 3 súpsk | Amarettolikør ella |
| 6 dropar | av mandludropum |
| 2 tesk | vaniljusukur |

Hakka nøtirnar í stórar bitar. Vaska appilsinina og rív skalið av. Rør smørið saman við sukrinum og siroppinum/hunanginum. Blanda eggið og appilsinskalið í, og rør síðani restina í. Forma deiggið í fýra rullur, sum eru líka langar sum styttra síðan av bakiplátuni.

Legg rullurnar á bakiplátuna og slætta tær eitt sindur við lógvanum. Baka mitt í ovninum á 200 stigum í umleið 15 minuttir. Tak tær úr ovninum og legg tær at kólna í umleið 15 minuttir. Sker tær í skák petti og legg tey á plátuna aftur við skurðsíðuni upp. Baka pettini í 10-15 minuttir afturat. Vend teimum so báðar síðir fáa líka nógvan hita. Lat kølna á plátuni.

**MÍN BESTA UPPSKRIFT**
er nýggjur teigur í Vikuskiftis Sosialinum, har lesarin kann senda okkum sína bestu uppskrift, saman við mynd av rættinum og navni á kokkinum.

Øll sløg av uppskriftum eru vælkomnar, bæði bakstur, matur og drekka, men tær skulu ikki hava verið almannakunngjørdar áður.

Send tína bestu uppskrift til:
**Sosialurin**
**Postboks 76**
**FO-110 Tórshavn**
**mrk. uppskrift**

Ella til post@sosialurin.fo.

Uppskriftin, sum verður prentað í blaðnum, fær *gávukort á kr. 300,-* frá **Thomas Dam búnýti**



Thomas Dam búnýti

TÓRSHAVN
Niels Finsensgøta 18
tel. 36 30 00

SALTANGARÁ
Heiðavegur 56
tel. 44 76 04

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Törnroos

# Doyp barnið sum tey kendu

ONGIN DOYPUR BØRN SÍNI TIL SO LØGIN NØVN SUM TEY KENDU Í **HOLLYWOOD**. KNOX, CIEL, APPLE, BRONX MOWGLI ERU NØKUR AV TEIMUM.

**Ør og kend – tá mugu børnini eita okkurt øðrvísi:**
Pilot Instruktor (Jason Lee)
Puma Rose (Erykah Badu)
Mars Merkaba (Erykah Badu, aftur)
Ocean (Forrest Whitaker)
True (Forrest Whitaker, aftur)
Sonnet (Forrest Whitaker, aftur hesuferð)

MYNDIR: POLFOTO



*Zahara og Pax saman við foreldrunum, Brad Pitt og Angelina Jolie*

**Tey sum dáma óvanlig dreingjanøvn við X:**
Maddox (Brad Pitt og Angelina Jolie)
Pax (Brad Pitt og Angelina Jolie)
Knox Léon (Brad Pitt og Angelina Jolie)
Bronx Mowgli (Ashlee Simpson og Pete Wentz)

**Tey romantisku, sum dáma blomstrandi gentunøvn:**
Violet (Ben Affleck og Jennifer Garner)
Bluebell Madonna (Geri Halliwell)
Daisy (Jamie Oliver)
Poppy (Jamie Oliver)
Angel Iris (Scary Spice Melanie Brown og Eddie Murphy)
Dolly Rebecca Rose (Rebecca Romjin)
Charlie Tamara Tulip (Rebecca Romjin aftur, hesar eru tvillingar)



*Apple og lítlibeiggin Moses eru børn hjá Gwyneth Paltrow*

**Tey sum helst vilja eta síni børn:**
Apple (Gwyneth Paltrow og Chris Martin)
Peaches (Bob Geldof og Paula Yates)
Saffron Sahara (Simon og Yasmin Le Bon)
Olive (Isla Fisher og Sacha »Borat« Baron Cohen)
Clementine Jane (Ethan Hawke)

**Tey sum dáma nøvn við Z:**
Zahara (Brad Pitt og Angelina Jolie)
Cruz (Posh Spice og David Beckham)
Zuma Nesta Rock (Gwen Stefani)
Zion (Lauryn Hill og Rohan Marley)

**Tey sum dáma staðarnøvn:**
Brooklyn (Posh Spice og David Beckham)
Savannah (Marcia »Bree« Cross)
Dakota (Melanie Griffith og Don Johnson)
London Emilio (Slash úr Guns N' Roses)
Paris (Michael Jackson)
Chelsea (Bill og Hillary Clinton)
Alabama Gypsy Rose (Drea »Sopranos-Adriana« De Matteo)
Kingston (Gwen Stefani)
Kenya (Nastassia Kinski og Quincy Jones)
Ireland (Alec Baldwin og Kim Basinger)



*Victoria Beckham og elsti sonurin Brooklyn*